**Enska Premier League**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 22 | 20 | 1 | 1 | 48 | 11 | 37 | 61 |
| 2 Manchester Utd. | 22 | 13 | 6 | 3 | 41 | 20 | 21 | 45 |
| 3 Liverpool | 20 | 13 | 5 | 2 | 29 | 11 | 18 | 44 |
| 4 Tottenham | 22 | 11 | 7 | 4 | 31 | 19 | 12 | 40 |
| 5 Arsenal | 21 | 11 | 4 | 6 | 34 | 15 | 19 | 37 |
| 6 Wigan | 22 | 11 | 1 | 10 | 25 | 27 | -2 | 34 |
| 7 Bolton | 20 | 9 | 6 | 5 | 25 | 20 | 5 | 33 |
| 8 Manchester City | 22 | 9 | 4 | 9 | 30 | 25 | 5 | 31 |
| 9 Blackburn | 21 | 9 | 4 | 8 | 26 | 25 | 1 | 31 |
| 10 West Ham | 22 | 8 | 5 | 9 | 29 | 31 | -2 | 29 |
| 11 Charlton | 20 | 9 | 1 | 10 | 26 | 30 | -4 | 28 |
| 12 Fulham | 22 | 7 | 5 | 10 | 26 | 30 | -4 | 26 |
| 13 Newcastle | 21 | 7 | 5 | 9 | 20 | 24 | -4 | 26 |
| 14 Everton | 22 | 8 | 2 | 12 | 15 | 31 | -16 | 26 |
| 15 Aston Villa | 22 | 6 | 7 | 9 | 26 | 32 | -6 | 25 |
| 16 WBA | 22 | 6 | 4 | 12 | 21 | 31 | -10 | 22 |
| 17 Middlesbrough | 21 | 5 | 7 | 9 | 25 | 37 | -12 | 22 |
| 18 Portsmouth | 22 | 4 | 5 | 13 | 16 | 34 | -18 | 17 |
| 19 Birmingham | 21 | 4 | 4 | 13 | 15 | 31 | -16 | 16 |
| 20 Sunderland | 21 | 1 | 3 | 17 | 16 | 40 | -24 | 6 |

Føroyskir leikarar: Ingi Højsted (Birmingham)

**Enska League Championship**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Reading | 29 | 22 | 6 | 1 | 61 | 15 | 46 | 72 |
| 2 Sheff Utd. | 29 | 19 | 6 | 4 | 54 | 27 | 27 | 63 |
| 3 Leeds | 28 | 15 | 7 | 6 | 38 | 24 | 14 | 52 |
| 4 Watford | 29 | 13 | 10 | 6 | 46 | 34 | 12 | 49 |
| 5 Crystal Palace | 27 | 14 | 5 | 8 | 43 | 28 | 15 | 47 |
| 6 Preston | 28 | 10 | 14 | 4 | 35 | 22 | 13 | 44 |
| 7 Wolverhampton | 29 | 10 | 12 | 7 | 34 | 26 | 8 | 42 |
| 8 Cardiff | 29 | 11 | 8 | 10 | 39 | 35 | 4 | 41 |
| 9 Burnley | 29 | 11 | 6 | 12 | 39 | 38 | 1 | 39 |
| 10 Norwich | 29 | 11 | 6 | 12 | 33 | 37 | -4 | 39 |
| 11 QPR | 29 | 10 | 9 | 10 | 34 | 39 | -5 | 39 |
| 12 Luton | 29 | 11 | 5 | 13 | 41 | 41 | 0 | 38 |
| 13 Stoke | 29 | 12 | 2 | 15 | 35 | 41 | -6 | 38 |
| 14 Southampton | 28 | 7 | 13 | 8 | 29 | 30 | -1 | 34 |
| 15 Ipswich | 29 | 8 | 10 | 11 | 31 | 43 | -12 | 34 |
| 16 Derby | 29 | 6 | 14 | 9 | 39 | 41 | -2 | 32 |
| 17 Coventry | 29 | 7 | 11 | 11 | 34 | 43 | -9 | 32 |
| 18 Hull | 29 | 7 | 9 | 13 | 28 | 36 | -8 | 30 |
| 19 Sheff Wed | 29 | 7 | 9 | 13 | 24 | 34 | -10 | 30 |
| 20 Plymouth | 27 | 6 | 11 | 10 | 24 | 34 | -10 | 29 |
| 21 Brighton | 29 | 5 | 13 | 11 | 29 | 44 | -15 | 28 |
| 22 Leicester | 28 | 5 | 11 | 12 | 28 | 37 | -9 | 26 |
| 23 Millwall | 29 | 5 | 10 | 14 | 22 | 42 | -20 | 25 |
| 24 Crewe | 29 | 4 | 10 | 15 | 32 | 61 | -29 | 22 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)




*Hópin av svimjarum høvdu leitað sær á Toftir, har 24 kappingar vórðu avgreiddar leygardagin*

Mánadagur 16. januar 2005

# Tíðindaskriv frá Svimjifelagnum FLOT

**Seinasta leygardag var stór svimjikapping fyri bólkarnar 1 og 2 hildin á Toftum**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Bólkur 2 eru svimjarar fødd-ir ár 1995 og 1996, tað vil siga børn frá 9 til 11 ár. Bólkur 1 eru børn fødd eftir 1996, ella børn 9 ára gomul og yngri.

Kappast varð í 24 greinum, har svimjararnir yvirhøvur svumu á stuttum teinum. Tað vil siga frá 17 til 50 metra strekki.

Í bólki 1 varð úrslitið at Ægir fekk flest heiðursmerki, meðan Reki fekk næstflest og Flot triðflest. Eisini í bólki 2 varð tað Ægir sum fekk flest heiðursmerki; men nú varð tað Fuglafjarðar Svimjifelag sum fekk næstflest, og Reki sum fekk triðflest. Í samlaðu kappingina varð Ægir nummar 1, Reki nummar 2 og FS nummar 3.

**Ægir hevur breiddina**

Eftir úrslitunum at døma hevur Ægir í løtuni størstu breiddina í yngru deildunum, meðan eysturoyarliðini hava úrmælingarnar. Í bólki 1 gjørdi Óluva Jacobsen úr Leirvík bart, við at vinna allar 5 kappingar sum hon luttók í. Í bólki 2 var kappingin hørð og jøvn millum tær tríggjar Poulu Mohr úr Fuglafjarðar svimjifelagi, Turið S. Christiansen úr Reka og Biritu Debes úr FLOT. Poula var tann sum oftast vann á hinum báðum; men munurin var gjarna lítil og eingin, sum til dømis í 33 frí har Turið vann við tíðini 22 sekund og tveimum tíggjundapørtum, meðan hinar báðar høvdu tíðina 22 sekund og 3 tíggjundapartar. Altso bara éin tíggjundapartur millum tríggjar tær fremstu.

Hjá dreingunum í bólki 1 var tað serliga Jákup Eysturdal úr Ægir sum skaraði fram úr, við at vinna 3 gull og 2 silvur av teimum 5 einstaklingakappingunum, sum hann kundi luttaka í. Í bólki 2 var tað meira javnt býtt millum Alva Hjelm úr Ægir og Ólav Fjørdal úr Tvøroyar Svimjifelag, sum vunnu hvør sínar 2 gull, umframt Alvi 2 silvur og Ólavur 1 silvur.

Sum heild gekk kappingin rættiliga væl, og sluppu síðstu svimjararnir heim aftur umleið kl 17, eftir at kappingin byrjaði umleið kl 8 um morgunin.

Úrslitalistar og myndir frá stevnuni eru at finna á heimasíðuni hjá svimjifelagnum FLOT, www.flot.info

**Samlaða heiðursmerkjabýtið varð hetta:**

| Felag | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|
| Ægir | 11 | 9 | 4 |
| Reki | 7 | 5 | 6 |
| FS | 3 | 3 | 4 |
| TS | 2 | 3 | 1 |
| FLOT | 1 | 4 | 3 |
| HS | | 1 | 3 |
| Skeggjar | | | 1 |

## Taptu fyri oddaliðnum

Claus Bech Jørgensen spældi 74 minuttir av dystinum, tá Coventry um vikuskiftið vitjaði hjá Reading.

Coventry tapti dystin 2-0, men tað var tó ikki fyrr enn stutt fyri leiklok, at avgerðin í dystinum veruliga fall. Beint eftir steðgin hevði Dave Kitson lagt Reading á odda, og so royndi heimaliðið at dúva upp á leiðsluna. Coventry trýsti nógv, men oddaliðið megnaði at standa ímóti, og 12 minuttir fyri dystarlok kundi sami Kitson senda bóltin í kassan.

Sigurin bar við sær, at Reading nú er níggju stig undan næsta liðnum í enska League Championship. Coventry er á 17. plássinum. Seks stig omanfyri niðurflytingarstrikuna.

*-mørk*

ÚTBJÓÐING

**Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2006**

Flutningur av forknúsaðum gróti og skervi frá grótbrotinum í Skørðunum og oman á havnalagið í Porkeri verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til avgreiðsluna hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5. telf. 311 333, har frágreiðing og treytir verða útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land